# Sáttmáli
# millum
# Vinnumálaráðið
# og
# P/F Firum
# um
# gransking, menning og ráðgeving

## § 1 - Partarnir

Við heimild í løgtingslóg nr. 73 frá 25. mai 2009 verður gjørdur hesin sáttmáli millum Vinnumálaráðið, sum stuðulsveitara, og P/F Firum sum stuðulsmóttakara.

## § 2 - Endamál

Árliga játtan Løgtingsins til Havbúnaðarroyndir verður veitt til at stuðla tey í lógini § 2, stk. 1 nevndu endamálum, herundir at granska, menna og ráðgeva innan aling av vatnlivandi djórum og plantum og innan biotøkni. Ein partur av játtanini til P/F Firum fer til at fyrisita tey í lógini nevndu endamálum.

Visjónin hjá P/F Firum er VITAN TIL VARANDI ALING, og í sáttmálaskeiðinum 2027-2029 fer Firum at hava høvuðsfokus á gransking, menning og ráðgeving innan økir, ið eru tengd at:

- burðardyggari nýtslu av firðum
- lús og smittu
- fiskavælferð, umframt
- sýnis- og dátuinnsavnan og greining

Játtanin til Havbúnaðarroyndir hevur gjøgnum árini verið við til at uppbyggja týðandi granskingarførleikar innan aling og er sostatt grundleggjandi fyri, at Føroyar áhaldandi kunnu menna vitan á altjóða støði og sum beinleiðis verður nýtt til at menna føroysku alivinnuna. Yvirskipað kann sigast, at játtanin verður nýtt soleiðis:

- at starvsfólk á Firum kunnu skriva umsóknir til føroyskar og útlendskar granskingargrunnar
- til at tryggja eginfígging, tá søkt verður um fígging úr granskingargrunnum
- til at tryggja óhefta og fokuseraða gransking - eisini gransking, sum ikki hevur eksterna fígging.
- til íløgur í granskingarumstøður og
- til at skapa møguleika fyri at hava lesandi knýtt at virkseminum

At útgeva og leggja fram granskingarúrslit eru týðandi partar av at góðskutryggja granskingararbeiðið, og Firum raðfestur samstarv við aðrar granskarar, bæði í Føroyum og uttanlands. Hetta er viðvirkandi til at granskingarúrslit verða viðgjørd av øðrum og eftirmett, eins og atgongd fæst til granskingarúrslit frá hjá samstarvsfeløgum, sum beinleiðis kann gagna føroysku alivinnuni.

## § 3 - Lýsing

Burðardygg nýtsla av firðunum er ein fortreyt fyri framtíðar menning av føroysku alivinnuni. Føroysku firðirnir eru fjøltáttaðir við ymiskum umstøðum frá náttúrunnar hond. Vitan um havfrøðina, vistfrøðina og lívfrøðina á firðunum er avgerandi fyri at kunna meta um ávirkanina av alivirkseminum á umhvørvið og umvent – týdningin, ið umhvørvið hevur fyri alivirksemið. At kenna náttúrugivnu karmarnar, sum firðirnir seta alingini, hvørjar møguleikar og avmarkingar firðirnir hava, bæði í mun til verandi alivirksemi, nýggjar alihættir ella aling av nýggjum sløgum, er grundleggjandi fyri burðardyggu nýtsluna av firðunum og menningina av føroysku alivinnuni.

Góðar dátur, sum kunnu lýsa broytingar í árstíðini, og yvir ár, eru sera týðandi, fyri at tryggja burðardygga nýtslu av firðunum. Firum savnar sýnir til ein biobanka og dátur til tíðarseriur av lívfrøðiligu og fysisku umstøðunum á firðunum. Hesar tíðarseriur og biobanki eru ikki bert til gagns fyri verandi gransking, men eru eisini eitt gott grundarlag fyri framtíðar gransking og menning. Talan er um eina umráðandi íløgu, sum fer at geva nógvar møguleikar, tá søkt verður um fígging frá granskingargrunnum.

Afturat mátingunum mennir og góðskutryggjar Firum myndlar. Myndlar eru góð amboð til at lýsa m.a. rák, vatnskifti, hvussu skarn og fóðurrestir frá alivirkseminum spjaðast og søkka, umframt spjaðing av lús og aðrari smittu millum aliøkini. Myndlar kunnu tí geva betri yvirlit, fremja fatanina og geva innlit í viðurskifti, ið annars eru ring at máta og spáa um.

Ein partur av arbeiðinum er at meta um, hvussu broytingar í umhvørvinum kunnu ávirka alivirksemi í framtíðini. Eitt nú hvussu hækkandi sjóvarhiti ávirkar lúsasmittu og um og í hvønn mun alivinnan kann tillaga seg broyttu umstøðurnar. Sum amboð betra myndlar um møguleikan at leggja virksemi á firðunum til rættis og eru tíein týðandi táttur í arbeiðinum at menna vitan um aling og hvørja ávirkan hon kann hava á firðirnar.

Ein av stóru avbjóðingunum í laksaalingini er framvegis lúsin, ið hevur neiliga ávirkan á fiskavælferðina, bæði tá hon situr á laksinum, eins og viðgerðin móti lús kann skaða fiskin. Harafturat kann lúsin hava árin á villan fisk, eins og kemisk avlúsingarevni kunnu hava neiliga ávirkan á umhvørvi. Lúsasmittan er kompleks og fyri at skilja hana til fulnar má vitan áhaldandi mennast um m.a. lívfrøðina hjá lúsini, hvussu hon spjaðist og mennist, og umførleikan hjá lúsini at gerast mótstøðufør móti avlúsingarevnum og -hættum.

Sambært kunngerð nr. 75 frá 28. juni 2016 um yvirvøku og tálming av lýsum á alifiski skal Firum telja lús á alilaksi í minsta lagi 14. dag. Góðar og neyvar lúsadátur eru neyðugar, tá avgerðir skulu takast av myndugleikum, tá alivinnan skal skipa virksemi og tá granskingarverkætlanir skulu skipast. Sjálvvirknar lúsateljingar hava verið ávegis í eina tíð sum ein nýggjur háttur at telja lús. Áðrenn hetta slagið av teljingum kann takast í nýtslu er neyðugt at tryggja, at sjálvvirknu lúsateljingarnar í minsta lagi geva líka góðar og álítandi dátur, sum tær verandi. Samstundis er tað altavgerandi at bæði myndugleikar, granskarar og almenningurin annars framhaldandi hava atgongd til dáturnar, soleiðis at tær, eisini, kunnu verða í arbeiðinum at framleiða vitan til varandi aling.



21-12-26

Vælferðin hjá alifiski er avgerandi fyri trivnaðin og mótstøðuføri í síni heild. Umstøður sum handfaring, avlúsing, skiftandi fysiskar umstøður, vatn/sjógvgóðska og smitta, frá rogni og fram til tøku, kunnu hava stóra ávirkan á fiskin. Á Firum verður arbeitt við at kanna hvussu ymiksu umstøðurnar ávirka vælferðina, heilsuna og treystleikan hjá alifiski - bæði laksi og rognkelsi.

Í sambandi við, at alt virksemi verður savnað í Hósvík verður Føroya fyrsta FishLab bygt, har umstøður veratil at gera royndir við livandi fiski og øðrum livandi verum. Hetta fer at skapa heilt nýggjar møguleikar hjá granskarum, íverksetum og føroysku alivinnuni at gera kanningar og fáa nýggja vitan um vælferðina hjá fiski. Møguleikin at gera slíkar kanningar í Føroyum, heldur enn uttanlands sum higartil, fer sannlíkt at styrkja samstarvið millum alivinnuna og granskingina, serliga tá talan er um fiskavælferð, RAS skipanir, vatngóðsku, generellu heilsustøðuna hjá alifiski og aling av øðrum verum o.a.

Firum hevur nógvar dátur um havfrøði, vistfrøði og lívfrøði á føroysku firðunum, um lús og um vælferð hjá laksi og rognkelsi, og nýggjar leggjast afturat hvønn dag. Harafturat verða nógvar dátur savnaðar hjá alivinnuni og hjá myndugleikum. Um dáturnar skulu gera veruliga nyttu er tað av stórum týdningi at tær verða viðgjørdar, greinaðar og samankoyrdar.

Firum eigur stórar rokni- og modelleringsteldur og umframt førleikar at viðgera dátur. Stór menning hevur verið innan dátugreiningarháttir seinastu árini, og til ber at gera greiningar og forsagnir, sum kunnu meta um gongdina í alivinnuni og møguligar vandastøður. Eisini kunnu greiningar gerast, sum skapa kunnleika um, hvussu broytingar í alivirkseminum og umhvørvinum ávirka hvørt annað. At gagnnýta tøkar dátur er ein samfelagsskylda og tí verður lagt upp til eitt tættari samstarv millum Firum og myndugleikar um viðgerð av dátum, soleiðis at bæði vinna og myndugleikar fáa eitt betri avgerðargrundarlag.

Fyri at kunna um nýggjastu granskingarúrslitini skipar Firum fyri árligu vísindaligu ráðstevnuni *Vitan til varandi aling*. Endamálið við ráðstevnuni er at savna granskarar og fakfólk, ið arbeiða við, ella hava áhuga fyri viðurskiftum knýtt at alivinnuni, og sostatt skapa ein pall til vitanardeiling, kjak og samstørv.

## § 4 – Firum flytur til Hósvíkar

Til tess at framtíðartryggja karmarnar til granskingarvirksemi verður alt virksemi hjá Firum miðsavnað í Hósvík. Nýggju umstøðurnar í Hósvík verða góðar og nútímans og tað inniber at til ber at skipa dagliga virksemi meiri effektivt og smidligt.

Flytingin til Hósvíkar er ikki bara ein praktisk avgerð, men eitt frambrot. Í nógv ár hevur virksemi verið spjatt kring landið, og hetta hevur verið avbjóðandi. Nú byrjar eitt nýtt kapittul við eini eind, einum felags heimstaði har øll starvsfólkini starvast undir somu lon.

Við nýggju kørmunum ber til at bera granskingina enn longur enn áður. Í Hósvík verða: skrivstovur, starvsstovur, verkstaður, goymsla, vælútbygt KT-krevið við góðum møguleikum at goyma dátur og fremja teldusimuleringar, góðar umstøður til granskingarfarið Andrias Reinert og Føroyar fyrsta sokallaða FishLab, har til ber atgera royndir við livandi fiski tengd saman til eina heild – eitt stað, har arbeiði við vitan, nýskapan og djúpum fakligum innliti kann spíra. Hetta er eitt savningarstig, sum gevur bæði førleikar og umstøður til at styrkja Føroyar sum leiðandi land innan burðardygga aligransking.



SLK 21/7-26

Samanumtikið fer miðsavnanin av virksemi felagsins at skapa:

- Størri samstarv – tí tá starvsfólk arbeiða lið um lið, verður vitanin deild beinleiðis, og nýggj hugskot verða lættari at seta í verk
- Best møguligar royndarumstøður – karmar, har livandi akvatiskar verur kunnu kannast undir tryggum og kontrolleraðum umstøðum, eru grundarlagið undir nýggjari vitan
- Ein greiðan samfelagsligan týdning – ein óheftan vitanarpall, har granskingarúrslit og vitan beinanvegin fara at gagna føroysku alivinnuni, styrkja djóravælferð og skapa størri burðardygd.

## § 5 – Sáttmálatíðarskeið

Sáttmálin er galdandi tíðarskeiðið 01.01.2027 til 31.12.2029. Partarnir taka upp samráðingar um nýggjan sáttmála eftir 01.04.2028. Stuðulsupphæddir og treytir annars í hesum sáttmála eru ikki bindandi fyri ein møguligan nyggjan sáttmala.

Avrikslisti skal gerast fyri sáttmálatíðarskeiðið. Á hvørjum ári verður ein ávegis avrikslisti gjørdur, sum verður útflýggjaður Vinnumálaráðnum saman við grannskoðaðum ársroknskapi.

## § 6 – Stuðul

Vinnumálaráðið rindar P/F Firum stuðul til endamál, sum svarar til árligu játtanina til Havbúnaðarroyndir á fíggjarlógini. Árligi stuðulin verður fluttur felagnum, tá Vinnumálaráðið hevur fingið avrit av grannskoðaðum ársroknskapi fyri árið frammanundan, tó soleiðis, at eitt aconto gjald á kr. 4 mió. verður útgoldið til P/F Firum í januar mánaða. Stuðulin er soleiðis treytaður av játtanini til Havbúnaðarroyndir á løgtingsfíggjarlógini fyri tey einstøku árini.

Vinnumálaráðið kann fáa útgreinaðar upplýsingar um verkætlanir, ið eru fíggjaðar av stuðlinum smb. hesum sáttmála, eins og Vinnumálaráðið kann í samráð við P/F Firum almannakunngera úrslitini.

Møguliga ikki nýttur stuðul fyri sáttmálatíðarskeiðið skal endurrindast til landskassan.

## § 7 - Stuðulsroknskapur, eftirlit v.m.

P/F Firum ger uppgerð yvir nýtsluna av stuðlinum fyri sáttmálatíðarskeiðið. Uppgerðin skal útgreinast soleiðis, at tað greitt framgongur, at stuðulin verður nýttur til røttu endamálini, smb § 2, og skal grannskoðast av løggildum grannskoðara. Í hesum sambandi bindur P/F Firum seg til at geva grannskoðaranum allar upplýsingar, sum eru neyðugar til grannskoðan av stuðlinum, og skal syrgja fyri, at grannskoðarin fær møguleika at gera tær kanningar, ið eru neyðugar fyri at grannskoða uppgerðina. Uppgerðin skal sendast Vinnumálaráðnum skjótast gjørligt, eftir at hon er grannskoðað og seinast 1. apríl aftaná at sáttmálatíðarskeiðið er úti.

## § 8 - Ársroknskaparframløga

Ikki nýttur stuðul skal framganga undir fíggjarstøðuni í grannskoðaða ársroknskapinum hjá P/F Firum. So hvørt sum stuðulin verður nýttur, skal hann førast yvir raksturin. Ársroknskapurin skal verða sendur Vinnumálaráðnum, so skjótt hesin er grannskoðaður, og seinast 1. apríl í hvørjum eftirfylgjandi ári.

## § 9 - Misrøkt/mishald

Verður sáttmálin misrøktur ella mishildin, kann hann verða uppsagdur eftir hóskandi ávaring og freist til at útvega írestandi upplýsingar ella rætta møguligar skeivleikar.

Dagfesting: 15/7-2026

Vinnumálaráðið

Jacob Vestergaard
Landsstýrismaður

Dagfesting:

Vinnumálaráðið

Pól E. Egholm
Aðalstjóri

Dagfesting: 21/7/2026

P/F Firum

Sunnvør Klettskarð í Kongsstovu
Nevndarforkvinna

Dagfesting: 21-7-26

P/F Firum

Johanna Lava Køtlum
Stjóri